# Førarahundur sum hjálpitól

**Tveir nýggir førarahundar fara skjótt at leita sær leiðina til Føroya. Tveir eru her frammanundan, og hevur John Pedersen frá Førerhundordningen hjá Dansk Blindesamfund verið í Føroyum seinastu dagarnar og kunnað um hetta**

HJÁLPITÓL
*Ingrid Bjarnastein*

Fyri at fáa ein førarahund skalt tú ikki kunna brúka sjónina hjá tær. Men tú skalt klára at ganga runt í býnum við hvíta stavinum og klára teg á tann hátt. Ja, krøv fylgja við um tú skalt hava ein førarahund, sum kostar 140.000 krónur, eins nógv og ein hampuligur bilur.

Førarahundarnir, sum koma til Føroya eru úr Danmark, og er tað Førerhundordningen hjá Dansk Blindesamfund, sum syrgir fyri tí.

John Pedersen hevur seinastu dagarnar verið í Føroyum fyri at kunna um hundarnar, tí tveir hundar eru væl á veg til Føroya.

– Hann er komin her bæði tí tað er bíligari hjá teimum at koma upp í eina viku enn at senda tvær familjur til Danmarkar til kunningar, og so eisini tí vit eru nógv onnur, sum ynskja meira vitan um førarahundar, sigur Karin Kass, leiðari á Blindastovninum.

Tað er nógv sum skal roynast ígjøgnum. Tann, sum skal hava hundin skal royna at ganga við einum hundi, og so verður farið niðuraftur at kanna, hvat fyri hundur er best egnaður til viðkomandi.

Ein førarahundur kostar, sum sagt, 140.000 krónur, men hetta kemur undir játtanina til hjálpitól, og tí er tað ikki ein upphædd, sum ein familja skal út við, um ein familjulimur hevur tørv á einum hundi.

– Vit onnur, sum síggja, eiga eisini at hava fyrivarni fyri hundunum. Tað er munur á, nær hann er til arbeiðis, og nær hann ikki er. Um hildið verður í boylanum, so er hann til arbeiðis, og tá skulu onnur ikki fara yvir at klappa honum ella rópa á hann, greiðir Karin Kass frá.

– Nógv halda, at tað er hundurin sum sær alt, og stýrir øllum, men tað er tann blindi, sum skal gera tað.

Bíðitíðin hjá Førerhundordningen er í løtuni á tveir til tríggjar mánaðar, og meta tey, at hetta er lítið í mun til onnur lond, har bíðitíðin er nógv longri.



*Kvark er førarahundur og hann hevur verið í Føroyum í tvey ár*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*John Pedersen frá Førerhundordningen hjá Dansk Blindesamfund hevur seinastu dagarnar verið í Føroyum og kunna um førarahundar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# 1.000 fólk til ábyrgdarafund

**Næstan 1.000 fólk verða til ábyrgdarafundin hjá Norðoya Sparikassa fríggjakvøldið í KÍ høllini. Tað er tað mesta nakrantíð**

ÁBYRGDARAFUNDUR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:**
Freistin at tekna seg til fundin var úti seinasta fríggjadag klokkan fýra. Í døgunum uppundir gjørdist tað greitt, at talan fór at verða um ta størstu undirtøkuna nakrantíð. Hetta gav teimum í Sparikassanum eitt sindur av høvurbrýggi, tí ikki var greitt, um tað fór at verða møguligt at fáa so mong at passa inn í høllina fríggjakvøldið. Síðani freistin var úti, hava tey so arbeitt við ymiskum møguleikum til at loysa henda trupulleikan. Tá tey nærum 1.000 fólkini sessast til borðs í høllini verða tað gott 800, sum koma at sita til borðs á gólvinum, meðan restin kemur at sita á einum palli, sum verður gjørdur tvørturum áskoðaraplássini niðan móti Bøgøtu. Pallurin kemur at verða um hálvan annan metur høgur árakað tey ovastu áskoðaraplássini.

– Vit hava arkitektar og aðrar við í hesi ætlanini, greiðir Gunnar Nolsøe frá. Hann er samskipari av øllum tiltakinum.

Hann sigur eisini, at soleiðis sum tilgongdin er í ár, so verður tað helst lítil ivi um, at næstu ferð ábyrgdarafundur verður, verða tað tveir fundir í staðin fyri ein.

Ein orsøkin til, at tað verða so mong til fundin í ár, er helst, at danski skemtarin Finn Nørbygaard fer at standa fyri undirhaldinum. Norðoya Sparikassi hevur um 1.800 ábyrgdarar, og talið er voksið støðugt seinastu árini.



*Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa, kann fegnast um at tann størsti ábyrgdarafundurin sum hevur verið nakrantíð, verður fríggjakvøldið í KÍ høllini*
*Mynd: Jens K. Vang*



# Ein politiskur glantrileikur

**Tað, sum Føroya fólk hildu vera eina samgongukreppu var ikki annað enn eitt fjølmiðlashow hjá Tjóðveldisflokkinum til tess at flokkurin kundi halda fram í samgonguni uttan at missa andlit, kom farm í Degi og Viku týskvøldið, eftir at sjónvarpið hevði fingið fatur á einum handriti hjá Høgna Hoydal**

FJØLMIÐLASHOW
*Eirikur Lindenskov*

– Tjóðveldisflokkurin kendi niðurstøðuna av samgongukreppuni longu áðrenn málið varð loyst, tí formaður Tjóðveldisflokksins, Høgni Hoydal hevði planlagt alt út í smálutir.

Hetta avdúkaði Dagur og Vika mánakvøldið, tá tey høvdu fingið fatur á manuskriptinum hjá Høgna Hoydal, har hann í smálutir hevði fyrireikað tað, sum skuldi henda, og hvat skuldi sigast.

Samgongukreppan, sum stóðst av, at Anfinn Kallsberg, løgmaður koyrdi Annlis Bjarkhamar úr starvi sum landsstýriskvinna, vardi í ellivu dagar.

Tað ljóðaði alla tíðina, at Tjóðveldisflokkurin tosaði saman um hetta málið, áðrenn samgongufelagarnir fingu nakað at vita. Einaferð lak út, at Tjóðveldisflokkurin fór at seta Fólkaflokkinum og løgmanni nøkur hørð krøv fyri at halda fram í samstarvinum, men tað er hetta, sum Sjónvarp Føroya mánakvøldið skírdi sum eitt fjølmiðlashow, tí at Høgni Hoydal alla tíðina visti, hvussu málið fór at enda, men at hann bara mátti fáa tað at síggja út sum um, at tað var Tjóðveldisflokkurin sum kom út sum sigursharrin og at flokkurin nú hevði fortalt Fólkaflokkinum, hvar skápið skuldi standa.

Høgni Hoydal hevði millum annað skrivað, at

*»Tjóðveldisflokkurin er fullsamdur um at geva tí (samstarvinum, red.) ein seinasta kjans…«.*

Og at

*»málini um landsantikvarin og um fiskivinnupolitikkin eru bert dropar í einum størri bikari…«*

Og tá fundurin endaði mánamorgunin segði Høgni Hoydal júst hesi orð við tíðindafólkini.

Annars hevði Høgni Hoydal ætlað at skipa fyri einum tíðindafundi í hølinum hjá Tjóðveldisflokkinum á Apotekinum mánadagin seinnapartin, vísir skjalið, sum sjónvarpið fekk fatur á – men tað skuldi vera áðrenn Dagur ogVika fór í luftina kl 20.

Í manuskriptinum hjá Høgna stendur víðari:

*»Tá fundurin millum formenninar eru liðugur, so biða vit fjølmiðlarnar koma niðan til okkara, har flokkurin kann standa samlaður og leggja fram.«*

Formaður Tjóðveldis-flokksins hevði eisini lagt til rættis, hvør skuldi verða við á tíiðndafundinum, og hvør skuldi siga hvat. Listin sær soleiðis út:

*»Tórbjørn um sjálvstýrismál*
*Heini um fiskivinnupolitikk*
*Kristian um íløgur og skúla*
*Páll um sosialmál og pensjón*
*Karsten um almanna bygnaðin«*

Niðurstøðan hjá sjónvarpinum var, at endamálið við leikritinum hjá Høgna Hoydal var at finna ein útveg hjá Tjóðveldisflokkinum at halda fram í samgonguni uttan at missa andlit, og prógva, at Tjóðveldisflokkurn ikki stendur í skugganum av Fólkaflokkinum.

Sambært sjónvarpinum, so hava hvørki Tjóðveldisflokkurin ella Fólkaflokkurin hug at slíta samgonguna.

Um so var, at samgongan slitnaði, so hevði uttan iva annar av flokkunum endað í andstøðu. Eygleiðarar vilja vera við, at ein nýggj samgonga so hevði verið skipað við trimum av teimum fýra stóru flokkunum. Ilt er at siga, hvør hevði staðið uttanfyri, men rættuliga hugsandi er, at annaðhvørt Tjóðveldisflokkurin ella Fólkaflokkurin høvdu staðið uttanfyri. Havandi orrustuna í summar í huga, tá stríð var um trúvirðið hjá løgmanni, so kundi tað illa verið hugsandi, at Javnaðarflokkurin ella Sambandsflokkurin fóru í samgongu við Anfinn Kallsberg sum løgmanni. Eisini eigur at verða havt í huga, at Fólkaflokkurin er hin minsti av teimum stóru flokkunum.

Men ræðslan hjá Tjóðveldisflokkinum og Fólkaflokkinum er helst at fara á oyðimarkarferð í andstøðu, har Javnaðarflokkurin hevur verið í skjótt sjey ár.



*Glantrileikur ella politikkur? Sjónvarpið fekk innlit í skjal, har Høgni Hoydal í smálutir hevði fyrireikað, hvussu stríðið skuldi enda*

# – Vit fyrireika okkum altíð

**Høgni Hoydal sigur, at tey í Tjóðveldisflokkinum fyrireika seg til allar støður**

FJØLMIÐLASHOW
*Eirikur Lindenskov*

– Eg má bara flenna eftir hasum, segði Høgni Hoydal við útvarpið í viðmerking til tað, sum kom fram í degi og viku týskvøldið. Hann sigur, at hann tímir ikki meira við hesum persónsmálunum.

– Um vit ikki koma víðari við politisku málunum, so er samgongan farin, segði Høgni Hoydal.

Men er tað so rætt, at Tjóðveldisflokkurin hevur lagt alt hetta til rættis?

– Ja, tað skulu vit erliga viðganga. Vit høvdu fyrireikað okkum til allar møguleikar. Tað gera vit altíð. Tað finnast óteljandi arbeiðspappír í Tjóðveldisflokkinum, og hetta var eitt av teimum, sum SvF hevur funnið onkustaðni, sigur Høgni Hoydal m. a. í viðmerking, sum er prentað í fullari longd á síðu 10 í blaðnum í dag.

– Men at SvF við hesum vil gera eina søgu um, at niðurstøðan av samgongufundinum varð gjørd upp á forhond, er beinleiðis skeivt og íspunnið, sigur formaður Tjóðveldsfoksins.

Hann sigur víðari, at hann fór á fund við samgonguflokkarnar og legði tær niðurstøður fram, sum flokkurin var komin til.

– Júst sum vit høvdu lovað at gera, áðrenn vit søgdu nakað alment. Eina útgávu, av hesum »misteinkiliga« pappíri, hevði eg við mær á fund. Um fundurin millum samgonguflokkarnar hevði gingið illa, so hevði verið ynskiligt hjá Tjóðveldisflokkinum at greitt frá støðuni beinanvegin. Men tað gjørdist ikki aktuelt og tí heldur ikki skilagott at halda nakran tíðindafund um støðuna, sigur Høgni Hoydal.



*Um vit nú ikki koma víðari við politikkinum, so slitnar samgongan, sigur Høgni Hoydal, sum sigur seg ikki tíma meira hetta persónsstríðið, sum hevur eyðkent politikkin seinastu tíðina*